Umhvørvismálaráðið

Dagfesting:	07.03.2024
Mál nr.:	23/16365
Málsviðgjørt:	AáH
Ummælistíð:	20. des. 2023-24. januar 2024
Eftirkannað:	27. februar 2024

Uppskot til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um framleiðslu, flutning og veiting av ravmagni (Elveitingarlógin)
(Framleiðsla og søla av el og fjarhita)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 59 frá 7. juni 2007 um framleiðslu, flutning og veiting av ravmagni (Elveitingarlógin), sum broytt við løgtingslóg nr. 104 frá 20. november 2007, § 10 í løgtingslóg nr. 18. frá 8. mai 2008, løgtingslóg nr. 79 frá 7. juni 2012, løgtingslóg nr. 184 frá 21. desember 2018, § 39 í løgtingslóg nr. 168 frá 16. desember 2021, § 19 í løgtingslóg nr. 31 frá 17. mars 2022 og § 10 í løgtingslóg nr. 31 frá 9. mars 2023, verða gjørdar hesar broytingar:

1. Heitið á løgtingslógini verður orðað soleiðis:

"Løgtingslóg
um
el og fjarhita"

2. § 1, stk. 1 verður orðað soleiðis:
"Løgtingslógin er galdandi fyri framleiðslu, flutning og veiting av el og fjarhita."

3. Í § 1 verða sum stk. 4 og 5 sett:
"*Stk. 4.* Tá ið SEV er nevnt í hesi løgtingslóg, verður sipað til uppgávuna hjá SEV sum eigari og kervisábyrgdari av elnetinum.
Stk. 5. Tá interkommunala elfelagið luttekur í kappingarútsettum virksemi, skal hetta gerast í sjálvstøðugum felag uttan persónsamanfall við lutafelagið SEV. Tó kann SEV hava ein nevndarlim í sjálvstøðuga felagnum, tó ikki nevndarforfólkið."

4. Í § 1, stk. 1, § 2, í heitinum á kapitli 2, § 7, stk. 2, § 9, stk. 1, 1. pkt. og stk. 3 og 4, § 15, 1. pkt. og § 19, stk. 2, verður "ravmagni" broytt til: "el". Í § 7, stk. 1, § 9, stk. 5, § 12, stk. 1 og § 25, stk. 3, 1. pkt. verður "ravmagn" broytt til: "el". Í § 11, stk. 3 verður "ravmagnsframleiðsluverk" broytt til: "elframleiðsluverk"

5. § 3 verður orðað soleiðis:
"**§ 3.** Kommunur kunnu luttaka í elveitingarvirksemi og fjarhitavirksemi sbrt. § 1, stk. 1, uttan mun til ásetingarnar í § 50, stk. 1 í kommunustýrislógini."

6. § 4, stk. 1 og 2 verða orðað soleiðis:
"Framleiðsla av el frá framleiðsluverkum omanfyri 11 kW, er einans loyvd við loyvi frá landsstýrisfólkinum. SEV ásetur standardtreytir fyri íbinding í elnetið av framleiðsluverkum upp til og við 11 kW. Íbindingartreytirnar skulu góðkennast av landsstýrisfólkinum.
Stk. 2. Loyvi verður latið fyri tíðarskeið ikki longri enn 20 ár, og kann verða longt við í mesta lagi 20 árum. Tó kunnu loyvi til skipanarberandi eindir hjá SEV verða longd við í mesta lagi 20 árum í senn."

7. Í § 4, stk. 5, 1. pkt. verður aftan á "útbúnað" sett: "og framleiðsluøki", og "og savningarøki" verður strikað.

8. § 5, stk. 1-4 verða orðað soleiðis:
"Tá landsstýrisfólkið viðgerð umsókn um loyvi eftir § 4 til bygging av nýggjum verkum til elframleiðslu, skal atlit takast at landsins orkutørvi og orkupolitikki sambært § 11, stk. 3, umframt til rættin hjá SEV at gagnnýta vatnorkuna.
Stk. 2. Landsstýrisfólkið lýsir alment eftir umsóknum um framleiðsluloyvi omanfyri 200 kW.
Stk. 3. Hesar umsóknir um loyvi kunnu viðgerast og latast uttan alment útboð:
1) loyvi til framleiðslu úr sólorku á egnum bygningi,
2) royndarloyvi sambært § 4, stk. 4 í løgtingslógini,
3) leingjan av loyvi sambært § 4, stk. 2,
4) loyvi til framleiðsluverk upp til 200 kW, og
5) loyvi og leingjan av loyvum til skipanarberandi eindir hjá SEV.

Stk. 4. Avlop frá framleiðsluverkum upp til 200 kW ætlað til egna nýtslu, kann leiðast inn á elnetið."

9. Í § 6, 2. pkt., § 7, stk. 1 og 2 og § 9, stk. 3 og 4 verður "netið" broytt til: "elnetið". Í § 9, stk. 2, § 19, stk. 2, § 20, § 23, stk. 1, nr. 2 og § 25, stk. 1, 2. pkt. verður "netvirksemi" broytt til: "elnetvirksemi". Í § 10, stk. 3 verður "netvirkseminum" broytt til: "elnetvirkseminum". Í § 12, stk. 4 verður "netvirksemið" broytt til: "elnetvirksemið". Í § 11, stk. 3 verður "-net" broytt til: "elnet". Í 11, stk. 5 verður "netinum" broytt til: "elnetinum".

10. Heitið á kapitli 3 verður orðað soleiðis:

"**Elnetvirksemi**"

11. § 9, stk. 1 verður orðað soleiðis:
"Einans SEV hevur loyvi til elnetvirksemi. Loyvið verður latið við treytum, sum landsstýrisfólkið ásetur.", og § 9, stk. 6 verður strikað.

12. Í § 10, stk. 1 verður "Netvirksemið" broytt til: "SEV", og í stk. 3 verður "av netvirkseminum" broytt til: "hjá SEV".

13. § 10, stk. 2 verður strikað.
Stk. 3 verður eftir hetta stk. 2.

14. Aftan á § 15 verður sum kapittul 3 a sett:

“Kapittul 3 a
Fjarhitavirksemi

§ 15 a. Veiting og søla av fjarhita ætlað til flutnings á fjarhitanetinum krevur loyvi frá landsstýrisfólkinum. Loyvi krevst eisini til at broyta og víðka fjarhitaskipanir. Loyvi krevst tó ikki til fjarhitavirksemi við einum framleiðslumátti undir 200 kW, og har ongin brúksskylda er.
Stk. 2. Loyvi verður latið fyri tíðarskeið, ikki longri enn 20 ár, og kann verða longt við í mesta lagi 20 árum í senn.
Stk. 3. Loyvi kann bert veitast umsøkjarum, sum hava neyðugan sakkunnleika, førleika og fíggjarorku til tað virksemi, sum loyvi verður veitt til.
Stk. 4. Landsstýrisfólkið kann í loyvistreytum ella í kunngerð áseta reglur um, hvussu stórur prosentpartur av orkunøgdunum í fjarhitaveitingini í minsta lagi skal koma sum avlopshiti frá virkjum og varandi orkukeldum.
Stk. 5. Loyvishavin skal lata landsstýrisfólkinum upplýsing um, hvussu veitingarskyldan ætlandi verður hildin í loyvistíðarskeiðinum, og hvørji tilbúgvingarlig átøk kunnu setast í verk.

§ 15 b. Umsókn um loyvi til fjarhitavirksemi, ella loyvi at broyta og víðka eina fjarhitaskipan, skal innihalda upplýsingar um:
1) Umsøkjaran og virksemi umsøkjarans innan fjarhitaøkið,
2) økið, og búeindir og bygningar í økinum, sum eru grundarlag fyri umsóknini,
3) kommunala hitaveitingarætlan fyri økið, sum er grundarlag fyri umsóknini,
4) eina virkisgreining og eina samfelagsbúskaparliga greining og meting av verkætlanini, umframt eina samanbering við aðrar útbyggingarmøguleikar í mun til kostnað, nyttu og útlát av vakstrarhúsgassi,
5) ávirkan á umhvørvið,
6) fyrimunir og vansar við fjarhitaskipanini, og
7) um íbindingarskylda er partur av verkætlanini, ella um brúkarar einans skulu hava møguleika at binda í fjarhitaskipanina.

§ 15 c. Loyvi til fjarhitavirksemi verður latið við treytum, ið landsstýrisfólkið ásetur. Treytir kunnu setast við slag av hitakeldu og gagnnýtslu av avlopsorku, framleiðslurætt og framleiðsluskyldu, tøkan framleiðslumátt, íbinding í fjarhitanet, um uppseting og burturbeining av útbúnaði, tiltøkumátt fyri at halda veitingarskylduna, tíðarfreistir o.a.
Stk. 2. Landsstýrisfólkið kann í kunngerð áseta reglur um, hvussu prísir skulu roknast, prísáseting fyri íbinding og hitaveitingar, viðskiftatreytir, ómaksgjøld, upplýsing um útlát av vakstrarhúsgassi, og aðrar upplýsingarskyldur mótvegis kundum. Eisini kunnu reglur um kravdar góðkenningar frá elveitingareftirlitinum ásetast.

§ 15 d. Fjarhitavirksemið skal fíggjarliga hvíla í sær sjálvum, soleiðis at inntøkurnar eru hóskandi til at gjalda fyri rakstur og ætlaðar neyðugar íløgur.
Stk. 2. Loyvishavar skulu gera serstakan roknskap fyri fjarhitavirksemið.
Stk. 3. Landsstýrisfólkið kann, eftir samráðing við loyvishavan krevja, at virknisfremjandi tiltøk verða sett í verk

fyri støðugt at betra um raksturin av fjarhitavirkseminum.
Stk. 4. Løgtingslóg um innlit í fyrisitingina er galdandi fyri fjarhitafeløg, sum hava loyvi eftir hesi løgtingslóg.

§ 15 e. Loyvishavin hevur ábyrgd av, at veitingartrygdin og fjarhitagóðskan eru nøktandi.
Stk. 2. Loyvishavin skal arbeiða fyri, at størst møguligur partur av hitaveitingini er úr varandi orkukeldum, so útlátið av vakstrarhúsgassi alsamt er so lágt, sum gjørligt.
Stk. 3. Loyvishavin skal:
1) Máta orkunøgdina, ið verður framleidd, og orkunøgdina, ið verður seld, og
2) vera landsstýrisfólkinum til hjálpar í sambandi við eftirlitsarbeiði hansara.

Stk. 4. Landsstýrisfólkið kann áseta nærri reglur um, hvussu nøktandi veitingartrygd og fjarhitagóðska kann verða hildin, um økta gagnnýtslu av varandi orkukeldum og avlopshita, virknisfremjandi tiltøk o.a.

§ 15 f. Loyvishavi, ið ætlar at halda fram við virkseminum, eftir at loyvistíðarskeiðið er farið, skal í minsta lagi 2 ár áðrenn, at loyvið gongur út, søkja um leingjan av loyvinum.
Stk. 2. Um loyvishavi ætlar at gevast við fjarhitaveitingini, kann landsstýrisfólkið taka avgerð um framhaldandi rakstur av verkinum."

15. Aftan á § 15 f verður sum kapittul 3 b sett:

"**Kapittul 3 b**
Keyp og søla av el

§ 15 g. SEV keypir og selur alt el, ið verður flutt á elnetinum hjá SEV. Tó kunnu onnur selja el víðari í smásølu.

§ 15 h. SEV skal dagliga áseta bindandi tímaprís fyri næsta døgnið grundað á samansetingina av orkukeldum og kostnaðin av hesum, heruppií kostnaðin av netinum og skipanarberandi tænastum.
Stk. 2. SEV skal á heimasíðu síni, ella á annan hátt, kunngera prís og tíðarskeið fyri sølu. Eisini skal ein mett miðal prísforsøgn gerast fyri næstu dagarnar.
Stk. 3. SEV kann gera avsláttarskipanir fyri sølu av el til góðkendar hitapumpur sambært BK17, til elbilar, til stórkundar, til løðistøðir o.tíl.
Stk. 4. SEV kann gera avtalur um prís til størri kundar, sum eitt nú eru íbundnir háspenning, ið kunnu veita SEV skipanarberandi tænastur ella taka ímóti el, sum annars ikki hevði verið gagnnýtt.
Stk. 5. SEV kann áseta ymisk netgjøld í mun til skiftandi last á elnetinum.

§ 15 i. Landsstýrisfólkið kann í kunngerð áseta reglur um, hvussu prísir skulu roknast, meginreglur fyri gerð av prísskipanum, avsláttarskipanum og prísavtalum, prísáseting fyri íbinding og elveiting, tiltøkugjøld, útgreining av prísum í rokningum, viðskiftatreytir, ómaksgjøld, upplýsing um útlát av vakstrarhúsgassi og aðrar upplýsingarskyldur mótvegis kundum."

16. § 16, stk. 1, 1. pkt. verður orðað soleiðis:
"Áðrenn loyvi til framleiðslu av el verða boðin út ella loyvi til fjarhitavirksemi latin, skal metast um avleiðingarnar fyri náttúru og umhvørvi, og skulu úrslit av hesi

meting verða góðkend av landsstýrisfólkinum.”

17. Aftan á § 16 verður í kapittul 4 sett:

“**§ 16 a.** SEV og allir framleiðarar við loyvi eftir hesi løgtingslóg, skulu árliga rokna og upplýsa útlátsfaktorin, t.e. kg CO_2 fyri hvønn kWt, sum verður framleiddur ella seldur.
Stk. 2. Útgreinað útrokning skal í seinasta lagi 31. januar í hvørjum ári latast umhvørvismyndugleikanum í sambandi við útrokningar av útláti av vakstrarhúsgassi.”

18. Í § 20 verður aftan á “§ 9” sett: “, umframt til fjarhita eftir § 15 a,”.

19. Í § 21, 1. pkt. verður aftan á “§ 4” sett: “ella § 15 a”.

20. § 22, stk. 1, 1. pkt. verður orðað soleiðis:
“Loyvi eftir § 4 og § 15 a kunnu verða tikin aftur, um:”.

21. Aftan á § 22 verður sum kapittul 6 a sett:

“**Kapittul 6 a**
Útbúnaður og ognartøka

§ 22 a. Elleiðingar og fjarhitaleiðingar kunnu verða leiddar yvir og undir gøtur, vegir og annað lendi. Eigarar og leigarar av slíkum lendi skulu í minsta lagi 12 vikur, áðrenn verklagsarbeiðið byrjar, hava beinleiðis fráboðan um ætlaða arbeiðið, hvussu leingi tað varir og hvørjir ampar kunnu væntast.
Stk. 2. Eigarar og leigarar kunnu mótmæla, at leiðingar verða leiddar gjøgnum ognina. Mótmæli skulu latast orkumyndugleikanum í seinasta lagi 8 vikur aftaná móttøku av fráboðan. Metir orkumyndugleikin, at leiðingarnar elva til stóran fíggjarligan miss ella miklan ampa fyri avvarðandi ogn, kann orkumyndugleikin gera av, at leiðingarnar skulu førast aðra leið.
Stk. 3. Avgerðir um útbyggingar á eløkinum og fjarhitaøkinum, sum hava við sær uppsetan av útbúnaði á lendi, vøtnum ella havbotni, vegagerð og tunnilsgerð, øktar vatngoymslur o.tíl., skulu fráboðast eigarum og leigarum av lendi og avvarðandi kommunum í minsta lagi 6 mánaðir áðrenn, at arbeiðið ætlandi skal byrja.
Stk. 4. Lendið skal afturbøtast í góðan stand. Elvir arbeiðið at leggja leiðingar ella at uppseta útbúnað til skaða ella fíggjarligan miss, skal verklagseigarin rinda endurgjald sambært vanligum endurgjaldsreglum.

§ 22 b. Landsstýrisfólkið kann ognartaka lendi ella brúksrættindi á lendi í førum, har tað ikki er gjørligt at leiga ella keypa lendið og har mett verður, at tað er samfelagsliga neyðugt at fáa atgongd til lendið fyri at tryggja neyðugar útbyggingar á elorkuøkinum og fjarhitaøkinum.
Stk. 2. Ognartøka sambært stk. 1 skal fara fram eftir reglunum í lóg om forpligtelse til jords afgivelse til offentlige veje, havne og landingssteder, samt til offentlige skoler på Færøerne.
Stk. 3. Landsstýrisfólkið kann geva loyvishava, ið hevur loyvi sambært hesi lóg, tíðaravmarkaðan brúksrætt til ognartikið lendið.”

22. Í § 23, stk. 1 verður aftan á nr. 1 sum nýtt nr. sett:
“2) rekur fjarhitavirksemi uttan loyvi eftir § 15a, stk. 1 ella brýtur treytir ásettar í loyvinum sambært § 15a, stk. 4, § 15 c, § 15 d, stk. 2 og § 15 e, stk. 1-3,”.
Nr. 2-5 verða eftir hetta nr. 3-6.

§ 2

Stk. 1. Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Stk. 2. Landsstýrisfólkið ásetur í kunngerð, nær § 1, nr. 3, og § 15 h, stk. 1 og 2, sum ásett í § 1, nr. 15, koma í gildi.

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

1.1. Orsakir til uppskotið

Endamálið við lógaruppskotinum er at gera neyðugar tillagingar í elveitingarlógini at skunda undir grøna orkuskiftið. Eftirspurningurin eftir elorku fer at økjast munandi komandi ár, meðan framleiðslan av grønari orku skal útbyggjast við í minsta lagi 50 prosentum næstu 7 árini. Hetta merkir, at samlaða elskipanin á bæði framleiðslu- og brúkarasíðuni grundleggjandi má tillagast, so at varandi orkan verður útbygd og gagnnýtt. Samstundis er týðandi at halda fast við samhaldsføstu elskipanina við SEV sum megingjørð, har øll týðandi framleiðsla og søla av el fer um eina felagsskipan, sum kann stýra grøna orkuskiftinum.

Tað ber ikki til at tryggja eina sjálvberandi og burðardygga orkuskipan, um lóggávan ikki stuðlar undir hesum. Umframt at tryggja hetta, er endamálið við lógaruppskotinum at skipa elveitingarøkið sambært semjuni millum landsstýrið og Kommunufelagið frá mars 2022. Semjan ger greitt, at SEV hevur kervisábyrgdina, og at týðandi skipanarberandi verk eru natúrligur partur av netinum. Landsstýrið og SEV ynskja somuleiðis, at arbeitt verður miðvíst fram ímóti, at elframleiðslan úr varandi orkukeldum verður økt munandi komandi árini, so at málið um 100 prosent grøna elframleiðslu kann røkkast í 2030 ella skjótast gjørligt.

Tørvur er á greiðari reglum fyri, hvussu loyvið fæst til at framleiða el úr varandi orkukeldum inn á netið hjá SEV. Landið og SEV hava tí í felag gjørt eina tíðarfesta ætlan fyri komandi orkuútbyggingar. Farið verður við hesi lóg burtur frá eini skipan, har orkuframleiðarar bjóðaðu inn við verkætlanum um útbyggingar – sum onkutíð vórðu viðgjørdar og avgreiddar í skundi – til eina skipan har landið og SEV sum kervisábyrgdari í felag leggja eina ætlan fram í tíð fyri útbyggingar, so útbyggingar av neti og framleiðslu kunnu ganga hond í hond.

Lógarbroytingin verður við til at fjøltátta elframleiðsluna úr varandi orkukeldum, bæði tá talan er um stórar og smærri framleiðslur. Harumframt fer broytingin at geva kundaskaranum betri møguleikar at keypa el, tá framleiðslan í mestan mun stavar frá varandi orkukeldum. Eisini verða fjarhitaverk sett í ein samfelagsligan orkusamanhang, og har reglur verða ásettar, sum tryggja brúkaranum størri gjøgnumskygni um íbinding, prís og annað.

Ein høvuðsbroyting í lógarverkinum eftir semjuna millum landsstýrið og SEV er, at leikluturin hjá SEV, sum varðandi av skipanarberandi tænastum, verður meira eyðsýndur. Við broytingini verður nágreinað, at SEV eigur og rekur føroyska elnetið og við tí fylgir eisini ein ábyrgd av skipanarberandi eindum, sum eru neyðugar fyri at tryggja góðsku og stabilitet í elveitingini. Í semjuni eru skipanarberandi eindirnar eyðmerktar sum størri termisk verk, størri vatnorkuverk og møguligar vatnpumpuskipanir.

Ongin lóggáva er um fjarhitavirksemi, hóast nógvur fjarhiti er lagdur síðani síðst í 1980'unum. Við sjóhita økjast upphitingarmøguleikarnir eisini. Fjarhitafelagið í Tórshavn heitti í 2016 á landsstýrið um at gera reglur fyri fjarhitavirksemi og við støði í tí áheitanini, verður lógarverkið um fjarhita nú gjørt sum ískoyti til elveitingarlógina. Lóggáva fyri fjarhita er ásett í elveitingarlógina heldur enn í egna lóg av tí, at talan er um eitt virkisøki, sum í stóran mun er meinlíkt elveiting. Nógvar algongdar reglur ganga tí aftur, óansæð hvat slag av orkuveiting talan er um. Eitt nú reglur um roknskap, prísáseting, brúkaravernd,

veitingartrygd, atgongd at lendi, umhvørvisárinsmeting, eftirlit, leingjan av loyvum o.s.fr. Tí verður mett skilagott at savna reglurnar í somu lóg.

Ein ognartøkuheimild verður nú eisini útvegað til størri orkuútbyggingar, so sleppast kann undan at gera brúk av ognartøkuheimildum í aðrari lóggávu. Ein heimild, sum neyvan verður brúkt ofta, tí higartil hevur borið til at fáa avtalur í lag við lendiseigarar um langtíðarleigu og brúk av lendi til orkuútbyggingar. Við heimild í lógini um landsjørð, tað er løgtingslóg nr. 45 frá 15. mai 2007 um landsjørð, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 194 frá 23. desember 2018, hevur landsstýrið í kunngerð ásett treytir og prísir fyri leigu av landbúnðarlendi til orkuendamál, og eru hesar reglur eisini vegleiðandi fyri langtíðarleigu av ognarjørð til orkuendamál.

1.2. Galdandi lóggáva

Elveitingarlógin hevur 15 ár á baki og kom í einari tíð, har ynskiligt var at lata upp fyri kapping innan elframleiðslu og serliga at tryggja, at elframleiðsla úr varandi orkukeldum gjørdist ein størri partur av framtíðar orkuútbyggingum. Lógin kom eisini upprunaliga sum ein fylgja av, at 50 ára einkarrætturin hjá SEV fór at ganga út í 2013 og tørvur var at skipa orkuøkið á einum meira nútímans lógargrundarlagi, har latið varð upp fyri kapping um rættin at framleiða el úr varandi orkukeldum.

Lógin hevur virkað sum karmur um útbyggingar av elnetinum og elframleiðsluni seinastu 15 árini. Støðan og leikluturin hjá SEV hevur verið og verður framvegis eyðsýndur. SEV eigur og rekur í eini samhaldsfastari skipan elnetið og stóru vatnorkuverkini, og tað fer SEV framhaldandi at gera. SEV hevur havt og fer framhaldandi at hava ábyrgd av skipanarberandi tænastum, sum skulu tryggja stabilitet í elskipanini og elveitingini. Higartil hava oljuriknu verkini verið størsti garantur fyri at tryggja javnvág í elskipanini, men soleiðis skal ikki verða í framtíðini. Oljan skal burtur úr elframleiðsluni og skipanarberandi eindunum fyri at røkka málið um grøna elframleiðslu. Higartil hevur SEV eisini verið høvuðsframleiðari av el, men við tí útbyggingartørvi og útbyggingarferð, sum stendur fyri framman, verða tað alsamt fleiri feløg, sum bjóða seg fram sum partur av elframleiðsluni. Interkommunala elfelagið kann tó ígjøgnum dóttirfelag framhaldandi kappast um framtíðar framleiðsluloyvi á jøvnum føti við onnur feløg.

Galdandi lóggáva hevur avmarkaðar reglur um sølu, tað veri seg heilsølu ella smásølu, og SEV hevur altíð bæði framleitt og selt el. Kortini hava kommunur, havnir, tjaldingarpláss o.o. selt el víðari í smásølu til bátar, húsvognar o.tíl. Henda víðarisøla av el verður nú nágreinað í lógini, og verður henda søla eisini fevnd av krøvum í lógini um, hvørjar upplýsingar skulu nágreinast til kundan í elrokningini.

Á fjarhitaøkinum hava brúkarar alment víst á tað óhepna í, at fjarhitaøkið als ikki er regulerað, og tí er ongin yvirskipað stýring av útbyggingum. Heldur ikki hevur brúkaraverndin verið høgt í metum í mun til viðskiftatreytr, prís o.a. Funnist hevur verið at útrokningargrundarlagnum fyri fjarhitaprísinum og at íbindingartreytirnar eru ov tyngjandi fyri teir íbúgvar, sum verða raktir av brúksskyldu. Reglur verða nú settar fyri fjarhitavirksemi, sum eru rættiliga líkar teimum, sum eru galdandi fyri elvirksemi, bæði í mun til hvørji krøv verða sett til feløg, sum vilja hava loyvi til fjarhitavirksemi og til brúkaravernd.

Hesi seinnu árini eru ymiskar avtalur gjørdar fyri leigu av lendi til orkuútbyggingar, alt eftir hvussu tilgongdin til orkuútbyggingar av serliga vindi, hevur verið skipað og hvør hevur vunnið útboðini. Tørvur er á at fáa ein greiðan felags leist fyri langtíðarleigu av undirlendi til orkuútbyggingar. Sambært galdandi lóggávu um landsjørð, tað er løgtingslóg nr. 45 frá 15. mai 2007 um landsjørð, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 194 frá 23. desember 2018, skal eitt víddargjald gjaldast fyri leigu av undirlendi, sum verður brúkt til orkuútbyggingar. Festijørðin er framvegis ætlað til virksemi, hvørs endamál er matvøruframleiðsla og tí er umráðandi, at orkuútbyggingar ikki leggja hald á størri øki, enn neyðug eru til ta ávísu framleiðsluna. Víddargjøldini eiga tí heldur ikki at vera roknað fyri størri øki, enn orkuútbyggingin leggur hald á í útbyggingartíðarskeiðinum og í rakstrartíðini.

Tey leigugjøld, sum eru ásett í kunngerð um umsiting av landsjørðini, tað er kunngerð nr. 95 frá 23. oktober 2007 um umsiting av landsjørð, sum seinast broytt við kunngerð nr. 96 frá 3. juli 2013, verða eisini vegleiðandi og galdandi fyri avtalur, sum verða gjørdar fyri leigu av ognarjørð til orkuútbyggingar. Ber ikki til at fáa leiguavtalur í lag við ognarar, verður roynt at flyta orkuútbyggingina yvir á landsjørð og ber hetta heldur ikki til, og ognartøkutreytirnar eru loknar, ber til hjá landsstýrisfólkinum at ognartaka lendi.

Eyðsæð er, at ognartøka bara er galdandi fyri ognarjørð innan privata geiran, meðan landsjørðin ikki kann ognartakast av landinum, tí landið longu eigur jørðina frammanundan. Hinvegin kunnu brúksrættindi hjá øðrum á landsjørð ognartakast, men eyðsæð skulu slík rættindi heldur sigast upp, um heimild er fyri tí sambært avtalu ella lóg. Landsjørðin verður umsitin av Búnaðarstovuni.

1.3. Endamálið við uppskotinum

Endamálið við lógaruppskotinum er yvirskipað at:

- Staðfesta og nágreina samhaldsfasta leiklutin hjá SEV sum neteigari og kervisábyrgdari umframt formliga at áseta krøv til uppbýtið av virkseminum, sum frameftir verður útint í kapping við onnur, so at hetta er uttan persónsamanfall við SEV á leiðslu- og nevndarstigi.
- Gera lógarreglur fyri fjarhitavirksemi, sum seta fjarhitaveitingar í ein samfelagsligan orkusamanhang og tryggja fjarhitakundum størri gjøgnumskygni í viðskiftatreytir, prísáseting og tílíkt.
- Skapa fortreytir fyri enn betri gagnnýtslu av varandi orkukeldum, serliga við at gera tað møguligt at keypa el til ein lægri prís í tíðarskeiðum við stórum nøgdum av el, framleitt úr varandi orkukeldum.
- Útvega heimild at ognartaka lendi til orkuútbyggingar, tó at strembast skal eftir at fáa langtíðar leiguavtalur í lag við Búnaðarstovuna og eigarar, sum verða raktir av orkuútbyggingum.

1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

Við broytingini verður staðfest, at tað er SEV, sum er neteigari og kervisábyrgdari. Ætlanin er, at tað framhaldandi bara skal vera eitt samhaldsfast elnet fyri landið. Harvið verður sundurbýtið millum elnetið og skipanarberandi tænastur øðrumegin, og framleiðslueindir og annað virksemi hinumegin, ásett í lóg. SEV hevur framvegis serstaka kervisábyrgd at tryggja góðsku og stabilitet í elveitingini. Henda uppgáva fer at vaksa so hvørt, sum elframleiðslan úr varandi orkukeldum fer at økjast komandi árini. Skipanarberandi eindirnar eru Sundsverkið,

verandi vatnorkuverk hjá SEV, umframt ætlaða pumpuskipanin millum byrgingarnar í Heygadali og á Mýrunum í Vestmanna.

Ein avleiðing av skilmarkingini millum monopolvirksemi og kappingarútsett virksemi er, at stovnsbygnaðurin hjá SEV skal skilmarkast samsvarandi, so talan ikki bara gerst um fíggjarliga eyðmerking men eisini bygnaðarliga eyðmerking. Tí verður styttingin og navnið SEV frameftir knýtt at SEV sum neteigara og kervisábyrgdara. Interkommunala elfelagið, sum rekur royndar-, framleiðslu- og søluvirksemi er samstundis tann parturin, sum er ella kann verða útsettur fyri kapping. Henda skilmarking er ein staðfesting av semjuni millum landsstýrið og SEV frá mars 2022.

Við hesum lógaruppskotinum verður fjarhitavirksemi á fyrsta sinni lógarregulerað, soleiðis at loyvi krevst til fjarhitavirksemi, tá talan er um skipanir, sum hava ein innstalleraðan mátt, sum er størri enn 200 kW fyri hvørt fjarhitaverk sær.

Verandi fjarhitafeløg og fjarhitaskipanir koma undir kravið um loyvi eftir hesi lóg. Sama var galdandi fyri virksemið hjá SEV, tá elveitingarlógin kom í 2007. Orsøkin er, at tað nú krevst loyvi at reka fjarhitavirksemi. Loyvi at reka fjarhitavirksemi hongur óloysiliga saman við reglum um brúkaravernd. Tað ber illa til at tryggja kundaskaranum eina nøktandi brúkaravernd eftir hesi lóg, um ikki fjarhitaveitarin eisini er fevndur av lógini. Tí skulu fjarhitafeløg søkja um loyvi til verandi fjarhitavirksemi og fara tey øll at fáa eitt loyvi útskrivað eftir hesi lóg, eins og SEV eisini fekk loyvi til sítt virksemi fyri umleið 15 árum síðani. Loyvismyndugleikin hevur heimild at seta treytir við loyvunum.

Loyvisskipanin fyri fjarhitavirksemi verður rættiliga meinlík loyvisskipanini á elveitingarøkinum. Eisini verður meginreglan ásett um, at fjarhitavirksemið í feløgum, sum ein kommuna eigur ella luttekur í, skal fíggjarliga hvíla í sær sjálvum. Krøv verða sett umsøkjarum um at hava neyðugan sakkunnleika, førleika og fíggjarorku til ætlaða virksemi. Umsóknir um loyvi til fjarhitavirksemi skulu innihalda ávísar upplýsingar og eisini skal gerast ein virkis- og samfelagsbúskaparlig greining og meting av verkætlanini, íroknað eina kost nyttu greining í mun til CO_2-útlát, og metast skal um ávirkanina á umhvørvið og náttúru, sum viðvíkur allari ringrásini frá útbygging og til skipanin verður tikin í nýtslu, og til hon einaferð verður tikin úr nýtslu.

Loyvishavar skulu gera serstakan roknskap fyri fjarhitavirksemið og landsstýrið kann, eftir samráðing við loyvishavan, krevja at virknisfremjandi tiltøk verða sett í verk fyri støðugt at betra um raksturin av fjarhitavirkseminum. Roknskapurin skal fylgja ásetingunum í ársroknskaparlógini.

Lógaruppskotið ásetur harumframt reglur um sølu av el, bæði hjá SEV og víðarisølu, sum kommunur, havnir ella aðrir seljarar bjóða sínum kundaskara. Nýskipanin í reglunum er, at krav verður sett til gjøgnumskygnið í ásetan av elprísinum, so at kundin sær, júst hvussu elprísurin er samansettur, hvørji gjøld eru fyri flutning á elnetinum, skipanarberandi tænastur, umsitingar- og tænastugjøld o.s.fr. Upplýsingarnar skulu skilmarkast á rokningini til kundan. Eisini skal útlátið av CO_2 sjónliggerast mótvegis kundunum.

Heimild er útvegað fyri at áseta ymiskar elprísir, sum eru tongdir at framleiðslukostnaðinum av el. Prísurin kann verða ymiskur í tíðarskeiðum við útlitum fyri stórum nøgdum av el úr

varandi orkukeldum í mun til tíðarskeið við lítlum nøgdum, og har oljunýtslan er stór. Sama kann gera seg galdandi fyri netgjaldið, sum kann verða ymiskt í tíðarskeiðum, alt eftir um lastin á netinum er stór ella lítil.

Ásetingar eru um atgongd at leggja el- og fjarhitaleiðingar í gøtur, vegir og annað lendi og hvør mannagongd skal fylgjast í mun til fráboðan og kunning til eigarar og leigarar av undirlendinum og rættindi teirra at mótmæla grevstri og øðrum inntrivum.

Heimild er veitt fyri, at landsstýrið kann ognartaka lendi og brúksrættindi, har mett verður, at tað er neyðugt fyri at fremja útbyggingar á el- og fjarhitaøkinum, men einans um tað ikki er gjørligt at tryggja sær atgongd at lendi við avtalu. Tá avtalur verða gjørdar um lendisleigu, so skulu tey rættindi, sum ognarin, Búnaðarstovan ella festarin frammanundan hava, skerjast sum minst. Á henda hátt verður hildið fast í, at inntrivini á ognarjørð og landsjørð í sambandi við orkuútbyggingar skulu vera so lítil sum gjørligt, serliga tí at lendi í Føroyum er rættiliga avmarkað. Er talan um landbúnaðarjørð, fær bóndin ella festarin eisini ávísar ágóðar av einari orkuútbygging sum t.d. atkomuveg í hagan, sum gevur lættari atgongd at røkta seyðin. Vit vita av royndum, at tað er sambæriligt at hava vindmyllur standandi og seyð gangandi, og tí verða hegn eitt nú ikki sett kring vindmyllur. Soleiðis verður bitið hjá kríatúrum eisini avmarkað sum minst í sambandi við vindorkuútbyggingar og hevur hetta týdning fyri útrokning av endurgjaldinum til bøndur eftir lógini um landsjørð, sí løgtingslóg nr. 45 frá 15. mai 2007 um landsjørð, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 194 frá 23. desember 2018.

1.5. Ummæli og ummælisskjal
Lógaruppskotið er sent til ummælis hjá SEV, Kommunufelagnum, stjórnarráðunum, Vinnuhúsinum, Magn, Effo, Vindrøkt, Krafta, Felagnum føroyskir peningastovnar, Búnaðarstovuni, Búnaðargrunninum, Bóndafelag Føroya og Føroya Óðalsfelag.

Lógaruppskotið hevur eisini ligið frammi á almenna ummælisportalinum.

Ummælistíðin var frá 20. desember 2023 til 24. januar 2024. Øll, sum bóðu um longda hoyringarfreist, fingu játtað longda freist. Ummæliskjølini eru løgd við sum fylgiskjøl, og ein samandráttur av innkomnum hoyringarsvarum er í Ummælisskjalinum í Fylgiskjali 2.

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Lógaruppskotið hevur ikki beinleiðis fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur, tí útbyggingarnar hjá SEV verða fíggjaðar av SEV, sum er eitt lutafelag hjá føroysku kommununum, og útbyggingarnar av fjarhita verða vanliga fíggjaðar av fjarhitafeløgum í interkommunalari, kommunalari ella privatari ogn. Tó kemur fjarhitaøkið afturat sum eitt nýtt umsitingarøki, og sambært elveitingarlógini er heimild at áleggja loyvishavum at fíggja partar av landsins útreiðslum til umsiting og eftirlit.

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Lógaruppskotið hevur nakrar umsitingarligar avleiðingar fyri landið, við tað at fjarhitavirksemi verður tikið inn undir lógina og harvið eisini vanlig umsiting í sambandi við loyvisveitan, prísásetan, árinsmetingar og eftirlit. Higartil eru flestu orkuútbyggingar gjørdar, uttan at neyðugt hevur verið við ognartøku og vónin er, at framtíðar útbyggingar eisini verða gjørdar við støði í langtíðar leiguavtalum heldur enn við ognartøku. Krøvini um fíggjarligan og bygnaðarligan skilnað fyri monopolvirksemi og kappingarútsett virksemi hjá SEV, kunnu elva til eitt vet meira umsiting fyri SEV og kommunurnar, sum eiga SEV.

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Lógaruppskotið fær ávísar avleiðingar fyri vinnuna. Vinnufyritøkur fara at fáa møguleika at keypa el til lægri elpris í tíðarskeiðum við stórum nøgdum av el úr varandi orkukeldum. Sama verður galdandi fyri smákundar.

Eisini fáa fyritøkur, sum ynskja at framleiða grøna elorku til sín sjálvs, møguleika at søkja um loyvi upp til 200 kW, uttan at verða fevnd av kravinum um alment útboð.

Fjarhitafeløg hava higartil útint sítt virksemi uttan ítøkiligar lógarkarmar. Hetta verður broytt nú, og verður fjarhitavirksemi frameftir sett inn í ein samfelagsligan orkusamanhang, har atlit at veitingartrygd, prísútrokning o.a.m. nú verður regulerað eftir somu meginreglum sum fyri el.

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Tað, at meira ferð nú verður sett á orkuútbyggingar, verður mett at hava positivar avleiðingar fyri umhvørvið. Í sambandi við útbyggingar, verða árinsmetingar gjørdar og tá verða møguligar negativar avleiðingar eisini lýstar út í æsir fyri hvørja útbygging sær. Tað, at krøv nú verða sett til fjarhitavirksemið og hvussu nógv olja kann verða brúkt í fjarhitaveitingini, er eisini positivt fyri umhvørvið.

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Lógaruppskotið hevur avleiðingar fyri Fjarhitafelagið í Tórshavn og allar fjarhitabrúkarar við tað, at fjarhitaøkið nú verður lógarfest. Eisini kann lógaruppskotið fáa ávísar avleiðingar fyri jarðareigarar og festarar, nú uppskotið útvegar heimild at ognartaka lendi og brúksrættindi til orkuútbyggingar.

2.7. Millumtjóða sáttmálar á økinum
Lógaruppskotið hevur ikki beinleiðis avleiðingar fyri millumtjóða sáttmálar á økinum. Lógaruppskotið er ein liður í at útinna skyldur Føroya sambært Veðurlagssáttmálanum og Parísavtaluni, sum eisini er kjølfest í samtykta orku- og veðurlagspolitikkinum frá 2022.

2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar
Mett verður, at lógaruppskotið ikki er í andsøgn við Hoyvíkssáttmálan (Sáttmáli millum stjórn Íslands, øðrumegin, og stjórn Danmarkar og Føroya landsstýri, hinumegin), Evropeiska mannarættindasáttmálan, sambært anordning nr. 136 af 25. februar 2000 om ikrafttræden for Færøerne af lov om den europæiske menneskerettighedskonvention ella Sáttmála Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek, sambært bekendtgørelse nr. 35 af 15. september 2006 om rettigheder for personer med handicap.

2.9. Markaforðingar
Ongar kendar markaforðingar eru á økinum. Mett verður ikki, at lógaruppskotið fer at elva til markaforðingar.

2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv
Lógaruppskotið hevur ávísar avleiðingar í mun til revsing, tí brot á reglur innan fjarhitaøkið kunnu frameftir elva til revsing. Eisini kann leggjan av elleiðingum og fjarhitaneti hava inntrívandi avleiðingar fyri jarðareigarar og festarar og sama er við ognartøkuheimildinini, um hon verður brúkt. Tó verður ongin ognartøka framd uttan grundlógartryggjaða rættin um fult endurgjald.

2.11. Skattir og avgjøld
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um skattir og avgjøld.

2.12. Gjøld
Ongar reglur eru um gjøld. Í mun til prísásetan ásetur uppskotið, at fjarhiti skal prísásetast eftir hvíla í sær sjálvum meginregluni eins og longu galdandi fyri el.

2.13 Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?
Lógaruppskotið áleggur fjarhitafelagnum í Tórshavn at útvega sær loyvi til verandi og framtíðar fjarhitavirksemi, eins og øðrum feløgum, felagsskapum ella øðrum, sum antin hava ella fara undir at veita fjarhita.

Í sambandi við umsiting av lógini, kann landsstýrisfólkið krevja allar upplýsingar í sambandi við viðgerð av umsóknum um fjarhitavirksemi.

2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrisfólkið, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?

Landsstýrisfólkið kann í kunngerð áseta reglur um:

- hvussu stórur partur av fjarhitaveitingini í minsta lagi skal koma sum avlopshiti frá virkjum og varandi orkukeldum

- prísáseting fyri hitaveitingar og íbinding í fjarhitanet, viðskiftatreytir, ómaksgjøld, upplýsingarskyldu mótvegis brúkarum, o.tíl.
- hvussu nøktandi veitingartrygd og fjarhitagóðska kann verða hildin í fjarhitaveitingum, gagnnýtsla av varandi orkukeldum, virknisfremjandi tiltøk o.a.
- hvussu prísur til fjarhitakundar skulu roknast, upplýsingarskyldur, gerð av serstøkum roknskapi, o.tíl
- reglur um útboð og meginreglur um prísáseting av el alt eftir hvussu stórur partur av elframleiðsluni stavar úr varandi orkukeldum
- góðkenning av prísskipanum, sum Elveitingareftirlitið skal góðkenna

2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?
Lógaruppskotið gevur myndugleikanum heimild at fremja eftirlit við loyvum og loyvistreytum úti í lendinum og inni í skrivstovubygningum hjá teimum, sum virka eftir einum loyvi, sum er givið við heimild í lógini.

2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?
Lógaruppskotið verður ikki mett at hava aðrar avleiðingar enn tær, ið eru nevndar omanfyri.

2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

	Fyri landið ella landsmyndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss ella øki í landinum	Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Ja	Ja
Umsitingarligar avleiðingar	Ja	Ja	Nei	Ja	Ja
Umhvørvisligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Ja
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Sosialar avleiðingar			Nei	Nei	

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

Niðanfyri eru viðmerkingar til einstøku ásetingarnar í lógaruppskotinum.

3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

Til § 1, nr. 1.

Heitið á lógini er stytt frá "Løgtingslóg um framleiðslu, flutning og veiting av ravmagni" til "Løgtingslóg um el og fjarhita". Fjarhitaøkið verður nú partur av lógini og tí verður fjarhiti eisini partur av heitinum á lógini. Hugtakið ravmagn verður lítið brúkt í skrift og talu, tí verður mett skilabetri at brúka stutta orðið el í heitinum á lógini.

Til § 1, nr. 2.

Áseting um, at virkisøkið hjá lógini er víðkað til eisini at fevna um fjarhita, sum ongin lóggáva hevur verið um frammanundan.

Til § 1, nr. 3.

Her verður staðfest, at tá ið SEV verður nevnt í lógini, verður sipað til SEV sum eigari og ábyrgdari av elnetinum og leiklutin at tryggja skipanarberandi tænastur til elveitingina. Kervisábyrgdin fevnir m.a. um at tryggja javnvág í elveitingini.

Elnetið fevnir um netið frá framleiðslu til málaran hjá endabrúkaranum, herundir flutningsnetið og býtisnetið. Harumframt eru allar skipanarberandi eindir við tilhoyrandi framleiðslu, sum til dømis størri termisk verk, størri vatnverk og møgulig pumpuverk, partur av elnetinum.

Annað virksemi, sum t.d. royndar-, granskingar-, og menningarvirksemi við tilhoyrandi framleiðslu, kann framvegis verða útint av SEV, ella av øðrum saman við SEV, sum eigari og ábyrgdari av elnetinum. Sostatt er tað ikki longur SEV sum elframleiðari, ið sipað verður til í lógini, har SEV er nevnt. Hetta framgongur eisini týðiligt í broytingini av § 1, stk. 5, sum nágreinar, at annað virksemi hjá interkommunala elfelagnum skal skipast í sjálvstøðugt felag uttan persónsamanfall við lutafelagið SEV. Tó kann SEV velja ein nevndarlim í sjálvstøðuga felagnum, sum tó ikki kann vera nevndarforfólk ella varaforfólk í dótturfelagnum.

Við ásetingini er formligur skilnaður gjørdur millum SEV sum neteigara og kervisábyrgdara øðrumegin og onnur kappingarútsett virkisøki hinumegin. Fíggjarligi og bygnaðarligi skilnaðurin er beinleiðis úrslit av semjuni millum landsstýrið og Kommunufelagið frá mars 2022. Broytingin tryggjar, at øll virkisøki kunnu halda fram og mennast undir broytta lógarkarminum, har interkommunala elfelagið kann luttaka í kappingarútsettum virksemi ígjøgnum eitt ella fleiri dótturfeløg. Tað er heldur onki sum forðar fyri, at SEV kann keypa og selja serfrøðingavitan ímillum feløgini á handilsligum grundarlagi og harvið tryggja skynsaman rakstur. Á henda hátt kann betur vissa fáast fyri, at sjálvstøðug feløg hjá interkommunala lutafelagnum ikki fáa sersømdir frá SEV í mun til onnur feløg, sum sjálvstøðugu feløgini eru í kapping við.

Til § 1, nr. 4.

Orðið “ravmagn” verður fleiri staðni í lógini broytt til “el”. Frameftir verður helst sipað til lógina sum el- og fjarhitalógin, stytt EFL. Hetta er ein natúrlig avleiðing av, at tað sjáldan verður sipað til ravmagn í skrift og talu og at tað vanliga bara hevur verið sipað til lógina sum “elveitingarlógin”.

Til § 1, nr. 5.

Ásetingin verður víðkað til eisini at fevna um fjarhitavirksemi, sum kommunur luttaka í. Hetta er beinleiðis avleiðing av, at fjarhitavirksemi nú kemur undir lógina. Rættarstøðan hjá kommunum í mun til el og fjarhita verður nú løgfrøðiliga staðfest og javnsett.

Til § 1, nr. 6.

Við hesi broytingini verður krav sett um, at øll elframleiðsla, sum ætlandi skal leiðast inn á elnetið hjá SEV, krevur loyvi. Tó er eitt minstamark fyri, nær eitt loyvi krevur serstaka loyvisviðgerð. Markið er ásett til 11 kW. Elframleiðsla niðanfyri 11 kW fær eitt loyvi við standardtreytum, um framleitt verður inn á netið hjá SEV. Onnur elframleiðsla við mátti upp til 200 kW krevur eisini loyvi, óansæð um framleitt verður inn á elnetið ella ikki. Slík loyvi verða í stóran mun eisini latin við standardtreytum alt eftir, um talan er um sólorku, vindorku, vatnorku ella aðra orku og hvussu íbindingin í elnetið verður skipað í mun til egna nýtslu og sølu til SEV.

Elframleiðsla omanfyri 200 kW er við hesi broyting fevnd av reglunum um alment útboð. Ein arbeiðsbólkur umboðandi kommunur og myndugleika er settur at gera tilmæli um, hvussu berast skal at við framleiðsluloyvum størri enn 200 kW til egna nýtslu og við sølu av avlopsel inn á elnetið.

Íbindingartreytirnar, sum bæði skulu snúgva seg um tøkniligar treytir og prís fyri keyp og sølu, skulu góðkennast av landsstýrisfólkinum. Í roynd og veru letur landsstýrisfólkið sínar góðkenningarheimildir til elveitingareftirlitið at útinna.

Tøkniligu treytirnar skulu í høvuðsheitum snúgva seg um íbindingartreytir í elnetið hjá SEV. Í fíggjarligu standardtreytunum skal m.a. framganga, hvønn avrokningarprís avroknað verður eftir til loyvishavan fyri ymisk sløg av orkukeldum og -verkum, umframt treytir um møgulig onnur gjøld, ið verða knýtt at ymiskum framleiðsluvirksemi, alt eftir hvat slag av elframleiðslu, talan er um at leiða inn á netið hjá SEV.

Framleiðsluloyvi sambært § 4 í lógini, kunnu leingjast við upp til 20 árum, men við hesi broytingini kann talan í mesta lagi verða talan um leingjan eina ferð við tað at orðini “í senn” bert verða galdandi fyri eindir, sum lata elskipanini skipanarberandi tænastur. Høvuðsorsøkin er, at tað verður ikki mett rætt at brúka sonevnd rullandi loyvi innan elorkuframleiðslu, har tøknin er í støðugari menning og har vit hava sett okkum høg mál um at øll elframleiðsla á landi skal stava úr varandi orkukeldum.

Til § 1, nr. 7.

Við hesi áseting er heimildin hjá landsstýrinum nágreinað til at seta krav um, at loyvishavum kann verða álagt at samstarva um framleiðsluøki. Ein slík samstarvsskylda kann fyrst og fremst verða viðkomandi í mun til at samantvinna vind-, vatn- og sólorkuframleiðslu á økjum, har tað ber til, tí lendið í Føroyum er avmarkað. Tað ræður um at framleiða so nógv sum til ber av varandi orku á økjum, sum verða løgd út til slíka framleiðslu. Kravið um alment útboð hevur eisini við sær, at orkumyndugleikin skal tryggja øllum áhugaðum javnbjóðis møguleika at bjóða og tí ber ikki til at geva feløgum, sum hava fingið annað loyvi í sama øki, framíhjárættindi til fleiri útbyggingar á sama øki uttan alment útboð.

Til § 1, nr. 8.

Grein 5 í lógini verður nærum øll orðað av nýggjum, uttan stk. 5. Orsøkin er, at allar orkuútbyggingar skulu frameftir setast í ein samfelagsligan orkusamanhang samsvarandi kravinum í § 11, stk. 3 í lógini og ikki bara orkuútbyggingar, sum eru grundaðar á olju, vind ella vatn.

Orðingin í stk. 1 er broytt soleiðis, at lógin ikki longur nevnir nakra ítøkiliga orkukeldu, sum grundarlag fyri loyvi til elframleiðslu. Sostatt eru allar orkukeldur, sum verða brúktar til elframleiðslu, javnsettar og fevndar av lógini, eisini sjóvarfalsorka.

Vísandi til semjuskjalið frá 22. mars 2022 og til ásetingarnar í § 11, stk. 3 í verandi lóg, skulu orkumyndugleikin og SEV gera og semjast um eina tíðarfasta ætlan fyri útboð av framleiðsluverkum við varandi orku soleiðis, at útboð og útbygging av elskipanini kunnu ganga hond í hond. Ætlanin eigur í minsta lagi at fevna um útbyggingar fyri komandi fimm árini umframt metingar um næsta fimm ára skeiðið. Ætlanin eigur árliga at verða eftirhugd og dagførd. Allar almennar lýsingar eftir umsóknum um framleiðsluloyvi verða frameftir gjørdar við støði í útbyggingarætlanini og í reglunum um alment útboð. Hetta merkir, at øll almenn útboð av varandi orku til elframleiðslu, skulu fylgja einari ítøkiligari tíðarætlan. Henda ætlan kann kortini ikki geva vissu fyri, nær hvørt útboð er liðugt útbygt og klárt at taka í nýtslu.

Ásetingin í lógini, sum gevur landsstýrisfólkinum heimild at skipa open-door útboð í sambandi við óbidnar umsóknir, verður nú strikað. Høvuðsorsøkin er, at landsstýrið og SEV í felag hava gjørt eina tíðarfasta útbyggingarætlan samsvarandi § 11, stk. 3 í lógini. Tíðarfasta útbyggingarætlanin tryggjar, at útbyggingar av elnetinum ganga hond í hond við útbyggingar av elframleiðslu úr varandi orkukeldum. Harumframt kann staðfestast, at áhugin fyri orkuútbyggingum úr varandi orkukeldum er nógv størri í dag enn fyri 15 árum síðani og tí er ikki sami tørvur at skipa open-door útboð fyri at tryggja kapping á elframleiðsluøkinum. Eisini hevur open-door skipanin verið fyri nógvum atfinningum, tí skipanin kanska ikki í nóg stóran mun hevur tryggjað øðrum umsøkjarum javnbjóðis atgongd at søkja um loyvi vegna ov stuttar freistir o.a.

Í staðin er ásett í nýggju § 5, stk. 2, at landsstýrisfólkið skipar alment útboð í sambandi við alla elframleiðslu, sum krevur loyvi sambært grein 4 í lógini og sum hevur ein mátt størri enn 200 kW. Tó eru fimm undantøk til kravið um útboð og eru hesi lýst niðanfyri.

Tey fimm undantøkini snúgva seg um sólorkuframleiðsla á egnum bygningi, royndarloyvi til orkuframleiðslu, leingjan av verandi loyvum, smá orkuverk til eginframleiðslu og loyvi til skipanarberandi eindir hjá SEV.

Viðvíkjandi sólorku á egnum bygningi verður ikki mett, at viðurskiftini tala fyri almennum útboði, tí sólorkan júst verður framleidd á egnum bygningi og tí er heldur ongin støddaravmarking ásett.

Kravið um alment útboð er heldur ikki galdandi fyri royndarverkætlanir við nýggjari tøkni í styttri tíðarskeið, sum í mesta lagi kann vera 5 ár í senn. Dømi um slíka verkætlan er sjódrekaverkætlanin hjá Minesto og SEV í Vestmannasundi. Vanliga verða royndir framdar í stigum, har útbúnaðurin fyrst verður royndarkoyrdur fyri síðani at verða tillagaður og uppstigaður, so hvørt, sum royndarúrslitini tala fyri tí. Tí verður royndarvirksemi ikki mett at verða egnað til alment útboð.

Kravið um alment útboð er ikki galdandi, tá loyvi verða longd sambært § 4, stk. 2 í lógini. Sambært broyting 6 kunnu loyvi leingjast upp í 20 ár, sum er sama áramál, sum eitt loyvi vanliga verður latið fyri. Høvuðsorsøkin er, at upprunaloyvið longu fevnir um eitt ávíst øki, har undirstøðukervið er ment við netleiðingum, atkomuvegi, stýringum, viðlíkahaldi o.t. og tí ræður um at gagnnýta hetta tilfeingi alt loyvisskeiðið og so leingi mett verður, at talan er um skynsama framleiðslu við upprunaligu rakstrargøgnunum. Broytingin er, at nú verður proppur settur í, so tað ikki ber til at hava rullandi loyvi til elframleiðslu.

Henda áseting skal samanhaldast við broytingini í § 4, stk. 2 í lógini, har ein avmarking nú er ásett um, at tað bara ber til at leingja eitt loyvi eina ferð. Higartil hevur borið til at leingja loyvi upp til 20 ár "í senn". Framleiðsluútbúnaðurin verður alsamt mentur og gerst meiraeffektivur við tíðini. Tí má rúm bæði vera fyri, at gomul loyvi kunnu leingjast, men ikki í óavmarkaða tíð, og at aðrir loyvishavar og betri framleiðsluútbúnaður sleppur framat at framleiða el úr varandi orkukeldum.

Viðgerðin av einari umsókn um at leingja eitt verandi loyvi fer annars fram eftir somu meginreglum, sum tá ið ein nýggj umsókn verður viðgjørd.

Heldur ikki eru smá orkuverk upp til 200 kW, og sum eru ætlað til egna nýtslu, fevnd av kravinum um alment útboð.

Viðvíkjandi framtíðar útbyggingum av skipanarberandi eindum og tænastum er longu ásettir, at SEV sum neteigari, hevur hesar um hendi. Hetta merkir, at slíkar útbyggingar ikki eru fevndar av reglum um alment útboð, og er hetta staðfeset í fimta undantakinum.

Ásett er í stk. 4 í broytingini av § 5, at avlopsorka frá smáum framleiðsluverkum upp til 200 kW kann leiðast inn á elnetið. SEV hevur skyldu at keypa alla avlopsorku frá framleiðsluverkum upp til 200 kW og at avrokna sambært teimum prísum, sum eru ásett fyri smá framleiðsluverk í prísskránni og viðskiftatreytunum hjá SEV, sum Elveitingareftirlitið hevur góðkent. SEV og Elveitingareftirlitið hava longu ment eina skipan fyri hesi smáverk.

Til § 1, nr. 9 og 10.

Talan er um málsligar nágreiningar av ávísum orðum, nú fjarhitavirksemi ætlandi verður fevnt av lógini. Orðið net innan eløkið verður nú broytt til orðið elnet og netvirksemi verður broytt til elnetvirksemi í viðkomandi ásetingum og kapittulyvirskriftum fyri at hava týðiligari skilmarking í mun til fjarhitanet.

Til § 1, nr. 11.

Sum nýtt stk. 1 verður lógarfest, at samhaldsfasta skipanin við einum elneti heldur fram, tó við teirri nágreining, at tað einans er SEV, sum hevur loyvi til netvirksemi. Talan er um eina týðandi og prinsippiella staðfesting. Mett verður, at tað samfelagsliga og fíggjarliga er mest skynsamt at hava eitt samhaldsfast elnet til flutning og býtið av el til kundaskaran um alt landið. Henda staðfesting er í samsvari við semjuskjalið millum landsstýrið og SEV frá mars 2022.

§ 9, stk. 6 verður strikað, men innihaldsliga verður heimildin hjá landsstýrisfólkinum at góðkenna serligar prísir til góðkendar hitapumpur og elbilar flutt og broytt til eina kunngerðaheimild í kapitlinum um sølu. Talan er um heimildina hjá SEV at lata avsláttur til góðkendar hitapumpur og elbilar, sum higartil hevur verið ásett beinleiðis í lógini. Tað verður mett at vera ein ov stirvin og ótíðarhóskandi skipan at áseta elprísir við lóg í einari tíð, har arbeitt verður miðvíst fyri at seta ferð á orkuskiftið í samfelagnum og at skipa ein elmarknað. SEV hevur leingi havt eina prísskipan, ið letur avsláttur til stórkundar og aðrar kundabólkar, sum verður mett lítið øðrvísi enn at gera avsláttarskipanir til kundar, sum hava hitapumpur og elbilar. Ásetan av ymiskum elprísum til ymsar kundabólkar og at áseta ymiskar elprísir, alt eftir hvørjar orkukeldur verða brúktar í elframleiðsluni, verður mett sum ein týðandi táttur at eggja stórum sum smáum elkundum at skifta til el og brúka el, tá el er bíligast, t.e. í tíðarskeiðum tá mesta framleiðslan stavar frá varandi orkukeldum.

Til § 1, nr. 12.

Við hesi broyting verður nágreinað, at tað er leikluturin hjá SEV sum neteigari og kervisábyrgdari, sum er í fokus, tá sipað verður til SEV. Talan er um málsliga nágreining, sum eisini avspeglar bygnaðarliga skilnaðin millum virkisøkini hjá kommunala lutafelagnum samsvarandi semjuskjalinum frá mars 2022.

Til § 1, nr. 13.

§ 10, stk. 2 í lógini verður strikað sum avleiðing av bygnaðarbroytingum í interkommunala elfelagnum SEV samsvarandi semjuskjalinum frá mars 2022 og stk. 3 í lógini verður tí stk. 2.

Til § 1, nr. 14.

Við hesi lógarbroytingini verða lógarreglur ásettar um fjarhitavirksemi. Talan er um ein nýggjan kapittul, sum verður settur inn í lógina og aðrar tillagingar av ymsum greinum í lógini.

Í **grein 15 a** verður krav sett um, at loyvi krevst frá landsstýrinum til fjarhitaverk við einum installeraðum mátti á 200 kW ella meira. “Framleiðsla” av fjarhita frá t.d. einari brennistøð, einum oljuverki ella øðrum ídnaðarverki, er ikki fevnt av hesi lógini, men gagnnýtslan av slíkum hita í fjarhitaverkum við hitaveiting til ein kundaskara, er fevnd av lógini. Er talan um fjarhitaverk við einum mátti omanfyri 200 kW, er kravið um loyvi bert galdandi, um fjarhitaveitingin hevur brúksskyldu tongda at sær. Orsøkin til hetta er, at har talan er um íbindingar- og brúksskyldu, verður mett neyðugt at tryggja fjarhitakundum ávísa dygd, trygd og brúkaravernd við lóg.

Reguleringin av fjarhitavirkseminum verður gjørd eftir líknandi leisti, sum er galdandi fyri elveitingarvirksemi, m.a. við loyvisskipan og loyvistíðarskeiði upp til 20 ár. Tó kunnu loyvi til fjarhitavirksemi leingjast við upp til 20 árum í senn. Høvuðsorsøkin er, at niðurgrivin fjarhitaútbúnaður hevur væl longri livitíð.

Eisini eru krøv ásett til umsøkjarar, sum søkja um loyvi at reka fjarhitavirksemi, at hesi feløg hava førleika og fíggjarorku til at reka slíkt virksemi.Eisini eru reglur um veitingartrygd og tilbúgving, so tryggjast kann, at fjarhitakundar ikki eru í váða fyri at missa hitaveitingina í longri tíðarskeið.

Landsstýrisfólkið fær eisini heimild til í kunngerð, ella í loyvistreytum, at seta krøv um, at fjarhitaverk skulu brúka ávísa prosentvísa nøgd av avlopshita og varandi orkukeldum, fyri at fáa loyvi. Orsøkin er, at fjarhitin er í kapping við eitt rímiliga fjølbroytt úrval av grønum orkuloysnum, sum loysa seg fíggjarliga í mun til eina oljurikna upphitingarloysn og møguliga eisini í mun til eina fjarhitaloysn, sum ikki er 100 % grøn. Harumframt er eitt aðalmál við at áseta reglur til fjarhita, at fjarhitin verður settur inn í ein samfelagsligan orkusamanhang, so at fjarhitaútbyggingar verða gjørdar har, tað gevur góða meining og ikki har, tað ikki gevur eins góða samfelagsliga meining.

Í **grein 15 b** eru umsóknarkrøvini ásett. Ein umsókn skal eitt nú innihalda eina virkisbúskaparliga meting og greining yvir 20 ár, sum lýsir væntaða sølu, rakstrarútreiðslur, fastar útreiðslur, rentur og avskrivingar, gjaldførisyvirlit umframt yvirlit yvir ogn og skuld fyri ítøkiligu verkætlanina. Eisini skulu eigaraviðurskiftini lýsast, og hvussu virksemið bygnaðarliga verður skipað.

Ein samfelagsbúskaparlig greining sambært grein 15b, nr. 4 skal m.a. innihalda eina vigan av avleiddum fyrimunum og vansum av eini ítøkiligari fjarhitaloysn í mun til eina aðra grøna hitaloysn. Yvirskipað kundi ein greining tikið støði í, hvørja ávirkan ætlaða fjarhita-útbyggingin hevur á gjaldsjavna, mvg, skatt, avgjøld, btú, multiplikatorárin o.tíl. Eisini eigur umhvørvsvirðið við útbyggingini í mestan mun at vigast og setast í ein breiðari samfelagssamhang.

Hugsanin er ikki, at umsøkjarin skal gera eina djúptøka samfelagsbúskaparliga greining til hvørja einstaka umsókn um loyvi til fjarhitavirksemi, men heldur eina greining, ið skal byggja á hóskandi metingar yvir, hvussu omanfyri nevndu postar kunnu hugsast at ávirkast sæð í mun til aðrar grønar hitaloysnir.

Eisini skal metast um aðrar fyrimunir og vansar við einari fjarhitaútbygging, so sum at hiti verður gagnnýttur, sum annars hevði farið til spillis, møguleiki fyri at gagnnýta yvirskots-elorku í hitatangum, við hitapumpum ella tílíkt. Ein vansi við fjarhitaskipanum, sum fáa hita frá eitt nú brennistøðum er, at slíkar fjarhitaskipanir sambært evropeiskari allýsing ikki verða roknaðar sum ein grøn loysn, tí tær motivera óbeinleiðis til at varðveita nøgdirnar av burturkasti.

Ein háttur at meta um og hava eftirlit við, at fjarhitavirksemi alsamt lýkur lógarinnar krav um skynsama orkuveiting verður, at "benchmarka" fjarhitaveitingar í Føroyum við samsvarandi fjarhitaveitingar í grannalondunum í víðari merking, bæði í mun til búskap, kost-nyttu og orkusjónarmið, sum byggja á avlopshita, varandi orkukeldur o.a.

Eisini verður kravt, at ein meting skal gerast um, hvørja ítøkiliga ávirkan ætlaða fjarhitavirksemið kann væntast at hava á umhvørvið. Harumframt skal ein lýsing gerast av fyrimunum og vansum sum heild við ætlaðu fjarhitaskipanini frá byrjan til enda.

Tá søkt verður um loyvi til fjarhitavirksemi, skal eisini upplýsast, um íbindingarskylda er partur av verkætlanini ella um talan einans er um ein møguleika hjá brúkarum at binda í eina fjarhitaskipan. Orsøkin er, at tað eitt nú eigur at síggjast aftur í prísásetingini, um brúkarin verður fíggjarliga bundin at einari orkuveiting frá einari fjarhitaskipan í eitt longri áramál uttan møguleika til sjálvur at velja aðra orkuskipan, sum møguliga bæði er bíligari og meira umhvørvisligа burðadygg. Mett verður, at við økta útboðnum av burðardyggum upphitingarmøguleikum, er neyðugt at seta slík krøv til fjarhitaveitingar.

Í **grein 15 c** er ásett, at treytir kunnu setast í eitt loyvi til fjarhitavirksemi eins og galdandi innan eløkið. Eitt nú kunnu treytir setast um uppseting og burturbeining av útbúnaði, prísáseting fyri íbinding, hitaveitingar, viðskiftatreytir v.m. Landsstýrisfólkið fær eisini heimild at áseta reglur um somu viðurskifti í kunngerð. Verður gongdin hon, at vit fáa alsamt fleiri fjarhitaskipanir í framtíðini, so kann tað verða skilabetri at áseta flestu felags reglur í kunngerð heldur enn í treytir í teimum einstøku loyvunum, bæði fyri at betra um gjøgnumskygnið og lætta um umsitingarligu byrðuna við loyvisveitan.

Brúkaraverndin til fjarhitakundar verður tryggjað við at landsstýrisfólkið fær heimild at áseta reglur í kunngerð, sum áseta krøv til, hvussu fjarhitaprísir skulu roknast, hvørji íbindingargjøld og uppsagnartreytir skulu galda, hvørji ómaksgjøld kunnu ásetast o.tíl. Eisini skulu fjarhitafeløg upplýsa kundum sínum, hvussu stórt árliga útlátið av vakstrarhúsgassi er í hitaveitingini. Kundarnir skulu á rokningini síggja, hvussu stórt CO2-útlát er knýtt at teirra hitaveiting. Hesar upplýsingar skulu økja tilvitið um orkunýtslu og hvussu burðadygg orkuframleiðslan og orkunýtslan er, og um tað gongur rættan veg at minka útlátið av vakstrarhúsgassi.

Sambært **grein 15 d** verður tað eitt krav, at fjarhitavirksemið skal fíggjarliga hvíla í sær sjálvum, eins og tað er galdandi fyri virksemið hjá SEV. Harumframt skal serstakur roknskapur gerast fyri fjarhitavirksemið og krøvini í ársroknskaparlógini skulu haldast. Tað verður elveitingar- og fjarhitaeftirlitið, sum ítøkiliga ásetur prinsippini fyri, hvørjir partar av fjarhitavirkseminum skulu takast uppí, tá fíggjarliga kravið um at hvíla í sær sjálvum verður ásett. Krøv kunnu eisini setast til virknisfremjandi tiltøk fyri støðugt at betra um raksturin av

fjarhitavirkseminum, har olja annars hevur verið partur av veitingini. Hildið verður, at reglur sum hesar eru við til at tryggja, at eisini fjarhitin gerst so umhvørvisliga burðardyggur, sum gjørligt.

Av tí at krav er sett um, at fjarhitavirksemið skal fíggjarliga hvíla í sær sjálvum, og at kommunur ofta eiga ein part ella allan fjarhitaútbúnaðin, er ásett í lógini, at fjarhitafeløg verða fevnd av lógini um alment innlit. Dømi er um, at almenna partafelagið Visit Faroe Islands er fevnt av lógini um alment innlit, eins og at SEV er fevnt av almennum innliti.

Í grein **15 e** fáa loyvishavar til fjarhitavirksemi álagt somu skyldur at veita dygd og trygd í fjarhitaveitingini, sum SEV hevur á eløkinum. Loyvishavin skal støðugt arbeiða fram ímóti, at fjarhitin stavar úr avlopshita og varandi orkukeldum. Málið er, at ongin olja skal brúkast í fjarhitavirkseminum, og at útlátið av vakstrarhúsgassi er so lágt sum gjørligt. Hesi atlit eiga eisini at verða havd í huga í verklagsarbeiðinum, tá fjarhitaleiðingar verða valdar og lagdar, tí verklagsarbeiðið er eisini orkukrevjandi virksemi.

Í **grein 15 f** er ásett, at til ber loyvishavum at søkja um leingjan av fjarhitaloyvum. Leingjanin kann vera upp í 20 ár, men krevur tó eina ítøkilig meting og viðgerð sambært meginreglunum fyri søkjan av loyvi, sum eisini tekur støðu til haldførið í verandi útbúnaði og hvussu framhald av fjarhitaskipanini passar inn í samfelagsliga orkusamanhangin, sum tá verður galdandi. Í stk. 2 er ásett, at heldur fjarhitavirksemi uppat, skal landsstýrisfólkið taka støðu til, um og í hvussu virksemið skal halda áfram, ella um tað kann takast av.

Til § 1, nr. 15.

Reglurnar um keyp og sølu av el eru broyttar í mun til verandi lóg, og taka partvíst støði í tilmælinum frá arbeiðsbólkinum, sum gjørdi tilmæli um pkt. 7 í semjuskjalinum millum landsstýrið og SEV frá mars 2022. Tilmælið er soljóðandi:

"SEV keypir alla møguliga framleidda elorku og selur søluliðinum hana (smásøla ella heilsøla) við skiftandi tímaprísi, sum endurspeglar sveiggjandi framleiðsluútreiðslurnar gjøgnum samdøgrið í mun til tað til eina og hvørja tíð væntaða orkumiksið. Tá nógv vindorka er, lækkar elprísurin, og tá nógv olja verður brúkt í framleiðsluni, hækkar elprísurin.

SEV kunnger dagliga ein bindandi tímaprís fyri hvønn tíma teir næstu 24 tímarnar. Miðað eigur at verða ímóti rullandi 24 tímum, soleiðis at tað til eina og hvørja tíð er greitt, hvat prísurin verður komandi 24 tímarnar. Eisini skal SEV kunngera eina metta prísforsøgn fyri komandi dagarnar, sum er so neyv sum gjørligt.

Skiftandi tímaprísurin umboðar skiftandi útreiðslurnar í elframleiðsluni umframt yvirskot til neyðugar íløgur. Tímaprísurin byggir á veðurforsagnir komandi 24 tímarnar rullandi. Veruligu útreiðslurnar eru ikki kendar, fyrr enn samdøgrið er farið. Munurin á mettum og veruligum útreiðslum verður tí íroknaður tímaprísirnar fyri komandi samdøgrið.

Strembast skal eftir, at netgjaldið eisini kann vera skiftandi í mun til skiftandi trýst á elnetið. Á henda hátt, tá nógv vindorka er tøk og trýstið lágt, verður møguligt at lækka prísin meira.

Bert góðkendar fyritøkur kunnu luttaka í søluliðinum. Umhvørvisstovan og SEV menna saman krøvini til sølufyritøkurnar. Út frá hesum krøvum góðkennir Umhvørvisstovan sølufyritøkurnar.

SEV luttekur í søluliðinum, soleiðis at endabrúkarin altíð kann keypa elorku beinleiðis frá SEV. SEV skal gera sjálvstøðugan roknskap, sum vísir beinleiðis útreiðslurnar av at luttaka í søluliðinum. Útreiðslurnar fevna um bókhald og kundasamband og eiga tí at vera so lágar sum gjørligt. Fyri ikki at áleggja brúkaranum óneyðugar útreiðslur er ikki neyðugt at skipa hetta virksemið í sjálvstøðugt felag, so leingi søluliðið hjá SEV leiðir streymin beinleiðis víðari til endabrúkaran. Prísurin hjá endabrúkaranum er tí kunngjørdur heilsøluprísur frá SEV umframt veruliga kostnaðin av at umsita endabrúkaran.

Vil SEV luttaka í søluliðinum á jøvnum føti við aðrar sølufyritøkur og menna tænastur í søluliðinum, skal hetta gerast í sjálvstøðugum partafelag, sum er skipað soleiðis, at krossstuðul og persónsamanfall ikki eru møgulig.

SEV kann gera avtalu um lægri prís til størri kundar, sum eitt nú eru íbundnir háspenning ella kunnu veita skipanarberandi tænastur. Lægri prísurin skal umboða sparingar hjá SEV av at hava stóru kundarnar og skal góðkennast av Elveitingareftirlitinum."

Í hesum lógaruppskotinum eru nakrar av ásetingunum í tilmælinum frá nevnda arbeiðsbólki tiknar við. Hetta eru ásetingar, sum snúgva seg um at "*SEV keypir alla framleidda elorku og selur søluliðinum hana við skiftandi tímaprísi, soleiðis sum nevnt í tilmælinum.*" Tó kunnu onnur selja el víðari í smásølu til bátar, skip, húsvognar o.a. sí viðmerkingar til grein 15 g.

Í **grein 15 g** verður staðfest, at tað er SEV, ið keypir og selur alt el, ið verður flutt á elnetinum. Øll elframleiðsla, sum ikki er framleidd beinleiðis til egna nýtslu, skal inn á netið hjá SEV. Sostatt er tað framvegis SEV, sum keypir og víðariselur alt el, sum verður latið inn á elnetið.

Hetta merkir, at SEV, eins og nú, framhaldandi kann selja el beinleiðis til kundarnar. Eisini verður tað nú staðfest, at onnur kunnu selja el víðari í smásølu til sínar kundar. Her verður serliga hugsað um víðarisølu til bátar, húsvognar o.tíl. sum kommunur, havnir og festivalar o.o. í áravís hava boðið sínum kundum sum smásøla ella partur av aðrari veiting.

SEV verður sambært **grein 15 h** álagt skyldu at bjóða el alment til sølu og at áseta skiftandi prísir eftir, hvussu nógv grøn elframleiðsla er tøk á elnetinum. Eisini kunnu prísir fyri flutning á elnetinum og fyri skipanarberandi tænastur vera ymiskir. Útbodnu døgnprísirnir skulu kunngerast á heimasíðuni hjá SEV ella á øðrum talgildum atkomuligum staði.

Greitt er, at tíðarskeið við nógvari grønari elframleiðslu tala fyri lægri elprísi, meðan tíðarskeið við nógvari oljugrundaðari elframleiðslu tala fyri hægri elprísi av tí at oljan í nógv ár ikki hevur verið kappingarfør við vind og vatn. Fyri at tryggja gagnnýtslu av mestu elframleiðsluni, tá framleiðslan stavar úr varandi orkukeldum, skal SEV bjóða slíkt el út døgn fyri døgn, har møguleiki eisini er at áseta ymiskar tímaprísir í hvørjum døgni. Ætlanin er, at elprísirnir verða ásettir tíma fyri tíma yvir næstkomandi døgn, grundað á veðurforsagnir.

Ásetingin væntast at kunna viðføra, at privatir brúkarar eins og vinnukundar gerast meira tilvitaðar um, at tað eru tíðarskeið, har elframleiðslan er meira grøn og kappingarfør í prísi. Hetta fer at eggja brúkarum at tillaga elnýtsluna til slík tíðarskeið, tá tað ber til. Hetta fer eisini at gera tað møguligt at flyta ein part av elnýtsluni til tíðarskeið á døgninum, har nógv grønt el er tøkt og lítil ella ongin olja er í elframleiðsluni. Hetta fer neyvan í verki at vera framt við, at brúkarar tendra og sløkkja síni eltól so hvørt sum elorkan er bílig, heldur verða tað sjálvvirkandi skipanir, sum kunnu stýra eltólunum í mun til prísstøðið. Ásetingin er ein liður í at fáa betri stev í útboð og eftirspurning eftir varandi elorku og at eggja kundum til at brúka elorku, tá ið hon er grøn og bílig. Við nýggju skipanini fær SEV eisini størri rásarúm at veita munandi avsláttur í elprísunum, so at avlopsel úr varandi orkukeldum so vítt gjørligt verður gagnnýtt heldur enn at fara fyri skeytið.

Eisini er ein grundleggjandi broyting gjørd í netgjaldinum við tað, at SEV fær heimild at áseta skiftandi netgjald í mun til skiftandi last á elnetinum. Hetta er eisini liður í at benda elnýtsluna og elprísirnar til tíðarskeið, har nógv varandi elorka er tøk.

Í stk. 3 er ásett, at til ber framhaldandi hjá SEV at áseta avsláttarskipanir í elprísum fyri eitt nú góðkendar hitapumpur, elbilar, stórkundar o.tíl. Hetta er ásetingin í § 9, stk. 6 í løgtingslógini, sum nú er avtikin og innihaldsliga flutt til kapittulin um keyp og sølu av el.

Ásett er í stk. 4, at SEV eisini kann gera avtalu um avsláttur ella serprís til stórar ídnaðarkundar, sum eitt nú eru íbundnir háspenningsnetið ella til kundar, sum kunnu veita skipanarberandi tænastur, ella sum kunnu taka ímóti el í tíðarskeiðum, tá tað annars ikki hevði borið til at gagnnýtt el. Umráðandi er tó, at avslátturin ella serprísurin skal umboða sparingar hjá SEV av at hava stórar kundar til at avtaka el “ovarlaga” í elskipanini, ella sparingar av, at hesir stórkundar veita skipanarberandi tænastur til elnetið hjá SEV, og skal slík serskipan góðkennast av Elveitingareftirlitinum. Eisini er umráðandi, at allir stórkundar við ávísari stødd hava javnbjóðis møguleika at gera slíkar avtalur við SEV.

Í viðskiftatreytunum við stórkundarnar kann eitt nú verða ásett, at elveitingin kann brótast av, um SEV brádliga fær tørv á tí, at íbindingartreytirnar verða nakað lagaligari enn tær annars vildi verið, og at kundarnir skulu verða íbundnir netið á 10/20 kilovolt spenningi.

Sambært grein **15 i**, er heimild ásett til landsstýrisfólkið at áseta reglur, hvørs fremsta endamál er at skipa eina brúkaravernd til elkundar. Á rokningini til kundan skal upplýsast, úr hvørjari orkukeldu elveitingin er fingin, og harundir hvussu stórt útlátið av vakstrarhúsgassi hevur verið. Hetta kann gerast við støði í CO_2 roknaranum, sum Umhvørvisstovan og Burðardygt Vinnulív hava ment í felag og sum Umhvørvisstovan nú eigur og rekur.

Krøv verða eisini sett til útgreining av elrokningini til kundaskaran, heruppií hvussu stórt útlát av CO_2 er knýtt at elveitingini. Hetta fyri at økja tilvitið um burðadygga elframleiðslu og elnýtslu. Felag, sum selur el, skal útgreina kostnaðin fyri elveitingina. Útgreiningin skal í minsta lagi fevna um kostnað fyri framleiðslu, flutning av el, yvirlit yvir gjøld fyri skipanarberandi tænastur umframt aðrar tænastur knýttar at elveitingini. SEV greinar og skilmarkar støðugt sínar prísir fyri ymiskar veitingar og tænastur í elskipanini, soleiðis at tað neyvt ber til at prísáseta kostnaðin at flyta el á elnetinum og fyri skipanarberandi tænastur.

Talan er um nøkulunda somu heimildaráseting, sum fyri fjarhitapartin. Tó er hugtakið tiltøkugjald nýtt og bara galdandi á eløkinum. Tiltøkugjaldið (á donskum rådighedstarif) umboðar heilt ella partvíst kostnaðin fyri skipanarberandi tænastur hjá SEV, og verður ásett sum eitt gjald í mun til framleiðslu til egna nýtslu. Eginnýtsla verður vanliga allýst sum elnýtsla hjá brúkara, frá brúkarans egna framleiðsluverki.

Tiltøkugjaldið er ymiskt alt eftir, hvat slag talan er um av framleiðsluverki, t.v.s. stødd í mátti (kW), og um talan er um vatn-, vind-, sól-, sjóvarfall ella aðrar orkukeldur. Elveitingar-eftirlitið hevur góðkent støddina á tiltøkugjaldi fyri smáverk upp til 200 kW.

Til § 1, nr. 16.

Við hesi broyting av § 16 í lógini verður ásetingin víðkað til eisini at fevna um fjarhita-útbyggingar og at metast skal um avleiðingarnar fyri náttúru og umhvørvi í sambandi við øll sløg av loyvum til elframleiðslu, óansæð um framleitt verður inn á elnetið ella ikki.

Úrslit av árinsmetingini skulu góðkennast av landsstýrisfólkinum og kann landsstýrisfólkið góðkenna eina orkuútbygging, hóast útbyggingin í ávísan mun hevur negativar avleiðingar fyri umhvørvið. Talan skal bæði verða um staðbundna meting og eina heildarmeting.

Ætlanin er, at landsstýrisfólkið letur tað upp í hendurnar á náttúru- og umhvørvismyndugleikanum á Umhvørvisstovuni at áseta háttalagið fyri árinsmetingum sambært ásetingini og at meta um úrslit av náttúru- og árinsmetingum eftir hesi lóg.

Til § 1, nr. 17.

Grein **16 a** er nýggj áseting, har krøv um uppgerð av CO_2-sporføri er ásett. Tað gerst alsamt meira vanligt, at fyritøkur, sum framleiða eina søluvøru, hava tørv á at rokna sítt CO_2-útlát. Vinnuhúsið og vinnan leggja nógva orku í at leggja vinnufyritøkum lag á at rokna hesi tøl. Tí er eisini umráðandi at tað finnast álítandi føroyskir útlátsfaktorar, sum vísa, hvussu nógv kg CO_2 verður leitt út fyri hvønn kWt, sum verður brúktur í framleiðsluni, óansæð hvørt talan er um el ella fjarhita.

Fyri Umhvørvisstovuna hevur tað eisini stóran týdning, at fyritøkur, sum antin framleiða ella selja el og fjarhita, sjálvar standa fyri arbeiðinum at rokna út útlátsfaktorin, sum skal gerast samsvarandi altjóða viðurkendu ghg-protokollini ella sonevnda háttalagnum fyri uppgerð av vakstrarhúsgassi (vhg). Mett verður, at fyritøkur alsamt meira fáa brúk fyri at kenna sín útlátsfaktor í strembanini eftir at gerast leysar av olju og at veita sínum kundaskara tær upplýsingar um CO_2-útlát, sum alsamt meira verða eftirspurdar.

Allir kundar skulu á rokningini fáa upplýsing um, hvussu orkusamansetingin í teirra orkunýtslu hevur sæð út seinasta árið, og hvussu nógv CO_2 er tongt at teirra orkunýtslu. CO2-roknarin hjá Umhvørvisstovuni er eitt amboð, sum kann brúkast til endamálið, og er tað Umhvørvisstovan, sum á hvørjum ári dagførir roknarin á heimasíðu síni.

Til § 1, nr. 18

Ásetingin er avleiðing av, at fjarhitavirksemi nú eisini er fevnt av lógini og tí fáa feløg, sum longu nú útinna fjarhitavirksemi, eitt fjarhitaloyvi útskrivað við heimild í hesi lóg, og fáa hesi fjarhitaloyvi somu vernd móti rættarsókn sum elframleiðsluloyvi. Heldur ikki kunnu fjarhitaloyvi seljast øðrum ella setast í veð, uttan at landsstýrisfólkið hevur góðkent avtalutreytirnar partanna millum.

Til § 1, nr. 19.

Ásetingin er avleiðing av, at fjarhiti nú eisini er fevndur av lógini og verður heimild eisini útvegað at seta nýggjar treytir fyri fjarhitaloyvi, eins og fyri elframleiðsluloyvi. Sama mannagongd er galdandi fyri broyting av treytum í fjarhitaloyvum sum til broyting av treytum í elframleiðsluloyvum.

Til § 1, nr. 20.

Ásetingin er avleiðing av, at fjarhitavirksemi nú er fevnt av lógini og kunnu fjarhitaloyvi, latin við heimild í lógini, verða tikin aftur eftir somu treytum og meginreglum, sum galdandi fyri elframleiðsluloyvi.

Til § 1, nr. 21.

Við ásetingini í **grein 22 a**, verður heimild útvegað til at leggja leiðingar til el- og fjarhita, sum eru neyðugar fyri at tryggja nøktandi el- og fjarhitaveitingar sambært latnum loyvum. Fyrimyndin fyri ásetingini er í eltrygdarlógini. Orsøkin til, at reglurnar eru tiknar við í hesa lóg eru, at fjarhitavirksemi nú er fevnt av hesi lóg og mugu heimildirnar tí eisini víðkast til at fevna um fjarhitaleiðingar.

Ein loyvishavi, sum hevur fingið loyvi til at leggja elnet ella fjarhitanet, skal fylgja ávísari mannagongd og varskógva allar eigarar og leigarar, sum verða órógvaðir ella raktir av inntrivum í sambandi við verklagsarbeiðið.

Ásett er, at eigarar og leigarar á leiðini, har verklagsarbeiðið ætlandi skal gerast, skulu hava møguleika at samskifta við loyvishavan um aðrar møguligar linjuføringar fyri ætlaðu leiðingarnar í førum, tá tær munnu haldast at verða til óneyðugan ampa í júst teirra øki. Loyvishavin hevur tó ikki skyldu at finna aðra linjuføring, um tað eitt nú hevur stórar seinkingar ella meirkostnað við sær.

Verklagseigarin kemur undir vanliga endurgjaldsábyrgd, um arbeiðið elvir til skaða ella fíggjarligan miss hjá teimum, sum mugu tola, at grivið verður gjøgnum teirra ogn ella framvið teirra øki.

Í **grein 22 b** verður heimild latin landsstýrisfólkinum til at ognartaka lendi ella brúksrætt á lendi, tá tað er neyðugt fyri at fáa atgongd til lendi til ætlaðar orkuútbyggingar, sum mettar verða neyðugar fyri samfelagið við tað at elframleiðslan - og við tíðini eisini øll orkuframleiðsla - kann stava úr varandi orkukeldum samsvarandi málum Føroya at minka útlátið av vakstrarhúsgassi.

Ognartøka fer fram eftir reglunum í lov om forpligtelse til Jords Afgivelse til offentlige Veje, Havne og Landingssteder, samt til offentlige Skoler på Færøerne.

Áðrenn farið verður undir at ognartaka lendi ella brúksrættindini hjá festarum og øðrum til lendi, skulu samráðingar um at leiga ella keypa lendið hava verið partanna millum. Í slíkum samráðingum skal tryggjast, at inntrivini í ognar- og brúksrættindini vera so lítil sum gjørlig. Tað merkir eitt nú, at avtalur um leigu av undirlendi ikki skulu fevna um størri vídd av lendi enn neyðugt er at brúka til hvørja einstaka orkuútbygging. Hetta er eisini galdandi í førum, har ognarin, Búnaðarstovan ella festarin hava áhuga í at leiga so stórt lendi út til orkuendamál, sum til ber fyri á henda hátt at tryggja sær langtíðar leiguinntøkur av lendinum. Landsjørðin verður umsitin av Búnaðarstovuni og eisini tað lendi, sum verður ognartikið eftir hesi lóg.

Eisini er umráðandi at hava í huga, at tá avtalur verða gjørdar um lendisleigu, so skulu tey rættindi, sum ognarin, Búnaðarstovan ella festarin frammanundan hava, skerjast sum minst. Á henda hátt verður hildið fast um, at inntrivini á ognarjørð og landsjørð í sambandi við orkuútbyggingar, skulu vera so lítil sum gjørlig, serliga tí at lendi í Føroyum er rættiliga avmarkað. Er talan um landbúnaðarjørð, fær bóndin ella festarin eisini ávísar ágóðar av einari orkuútbygging sum t.d. atkomuveg í hagan, sum gevur lættari atgongd at røkta seyðin. Vit vita av royndum, at tað er sambæriligt at hava vindmyllur standandi og seyð gangandi og tí verða hegn eitt nú ikki sett kring vindmyllur.

Sambært galdandi lóggávu um landsjørð, tað er løgtingslóg nr. 45 frá 15. mai 2007 um landsjørð, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 194 frá 23. desember 2018,, skal eitt víddargjald gjaldast fyri leigu av undirlendi, sum verður brúkt til orkuútbyggingar. Tey leigugjøld, sum eru ásett í kunngerð um umsiting av landsjørðini, verða eisini vegleiðandi og galdandi fyri avtalur, sum verða gjørdar fyri leigu av ognarjørð til orkuútbyggingar. Eisini hevur bóndi rætt til rakstrarmiss fyri mist bit hjá seyði. Ber ikki til at fáa leiguavtalur í lag við ognarar, verður roynt at flyta orkuútbyggingina yvir á landsjørð og ber hetta heldur ikki til, og ognartøkutreytirnar eru loknar, ber til hjá landsstýrisfólkinum at ognartaka lendi. Eyðsæð er, at ognartøka bara er galdandi fyri ognarjørð innan privata geiran, meðan landsjørðin ikki kann ognartakast av landinum, tí landið longu eigur jørðina frammanundan. Hinvegin kunnu brúksrættindi hjá øðrum á landsjørð ognartakast, men eyðsæð skulu slík rættindi heldur sigast upp, um heimild er fyri tí sambært avtalu ella lóg. Landsjørðin verður umsitin av Búnaðarstovuni.

Bera samráðingarnar um leigu ella keyp ikki á mál, verður farið undir at ognartaka lendið. Lendið verður ognartikið við ognartøku skrivi frá landsstýrisfólkinum, og ognartøkan hevur virknað beinanvegin, sum ognartøkuskrivið er tinglýst á ognina. Síðani verður farið undir samráðingar um endurgjaldið. Sambært grundlógarinnar § 73 kann ognartøka bara fara fram móti fullum endurgjaldi. Um samráðingarnar um endurgjaldsupphæddina ikki koma á mál, verður málið at leggja fyri rættin. Eru treytirnar fyri ognartøku loknar, er mannagongdin fyri ognartøku vanliga tann, at landsstýrisfólkið tekur avgerð um ognartøku, og aftaná verður endurgjaldið ásett av einari metingarnevnd. Tað kann taka nakað av tíð at áseta endurgjaldið. Eru tann ella tey, sum eru rakt av ognartøku, ikki nøgd við støddina av endurgjaldinum, kann málið um støddina av endurgjaldinum roynast í Føroya Rætti.

Ásett er at enda, at landsstýrisfólkið kann geva loyvishava, ið virkar sambært elveitingarlógini, tíðaravmarkaðan brúksrætt til ognartiknað lendið, sum í mesta lagi kann svara til áramálið í tí loyvi, sum er latið eftir hesi lóg. Leigugjald skal rindast landinum sambært reglum um leigu av landsjørð til ymisk endamál.

Til § 1, nr. 22.

Talan er um at áseta revsing fyri ávís brot innan fjarhitaøkið, eins og galdandi er fyri ávís brot á elveitingarøkinum. Ásett er, at ein kann verða revsaður fyri at reka fjarhitavirksemi uttan loyvi, ella um ein brýtur treytir í fjarhitaloyvum, sum eru ásettar við heimild í lógini.

Til § 2.

Gildiskoman er ásett til dagin eftir, at uppskotið er samtykt, tó við ávísum undantøkum, soleiðis at landsstýrisfólkið við kunngerð kann seta partar av lógarbroytingini í gildi seinni. Orsøkin er, at tað tekur tíð hjá SEV at tillaga bygnaðin samsvarandi semjuskjalinum og broyttu ásetingunum í lógaruppskotinum, og at SEV hevur brúk fyri tíð at fyrireika og skipa eina prísskipan við dagligum almennum útboði av el við ymiskum prísum.

Umhvørvismálaráðið, 7. mars 2024

Ingilín D. Strøm
landsstýriskvinna

/ Pól E. Egholm

Yvirlit yvir fylgiskjøl:
Fylgiskjal 1: Javntekstur
Fylgiskjal 2: Ummælisskjal
Fylgiskjal 3: Ummælisskriv frá SEV
Fylgiskjal 4: Ummælisskriv frá Kommunufelagnum
Fylgiskjal 5: Ummælisskriv frá Landsverki
Fylgiskjal 6: Ummælisskriv frá Brúkaraumboðnum
Fylgiskjal 7: Ummælisskriv frá Maskinmeistarafelagnum
Fylgiskjal 8: Ummælisskriv frá Føroya Arbeiðsgevarafelag
Fylgiskjal 9: Ummælisskriv frá Føroya Náttúru- og Umhvørvisverndarfelag
Fylgiskjal 10: Ummælisskriv frá Tórshavnar kommunu
Fylgiskjal 11: Ummælisskriv frá Fjarhitafelagnum
Fylgiskjal 12: Ummælisskriv frá Brúkarafelagnum Skynsamur Fjarhiti
Fylgiskjal 13: Ummælisskriv frá Hiddenfjord
Fylgiskjal 14: Ummælisskriv frá Effo
Fylgiskjal 15: Ummælisskriv frá Sp/f Røkt
Fylgiskjal 16: Ummælisskriv frá Magn
Fylgiskjal 17: Ummælisskriv frá VITorka

Fylgiskjal 18: Ummælisskriv frá Vilhjálmur Nielsen, Danmarks Tekniske Universitet
Fylgiskjal 19: Ummælisskriv frá Jens Martin Lamhauge
Fylgiskjal 20: Semjuskjal millum Umhvørvis- og vinumálaráðið, SEV og Kommunufelagið, dagfest 22. mars 2022